## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og sirm, men seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Fyrrapartin gul til stívt andøvsgul av suðri og regn, men seinnapartin yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 14 og 17 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og regn av og á. Hitin millum 14 og 17 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av suðri og útsynningi, men sunnudagin minkar hann vindin niður í lot av ymsum ættum. Sólglottar, men eisini okkurt ælið. Hitin millum 11 og 15 stig.

## DAGSINS FERÐAFÓLK

# » Peter Ditmar, Frans Van der Aar og Jan Jacob Visser úr Hollandi«

**Niðri á Bryggjubakka liggur ein lítil bátur. Báturin eitur "Baanbreker", sum merkir slóðbrótari. Í honum sita fýra mans. Hesir fýra eru tríggir hollendarar og ein íri, sum teir hava bjóðað umborð til ein kaffimunn. Teir úr Niðurlondum hava siglt til Føroyar**



*Orð: Rókur Jakobsen*
*rokur@sosialurin.fo*

■ **Hví hava tit siglt til Føroyar?**

– Hetta er aðru ferð at vit royna at sigla til Føroyar. Fyrr ferðina var fyri trimum árum síðani, men tá gjørdist veðrið so buldrasligt, at vit mátt steðga í Hetlandi. Men vit vildu náa til Føroya, so tí royndu vit aftur í ár", siga tey fyrikomandi ferðafólkini. "Vit tíma ikki at ferðast sum øll hini. Tey flestu fara suðureftir, men tá ið vit fara norðureftir, fara vit undan teimum vanligu ferðastøðunum. Vit eru ikki so glaðir fyri hita, og vit vilja hava frið. Faktiskt er friður og náttúra, júst tað ið vit leita eftir, og tað finna vit her", siga teir

■ **Fylgja tit slett ikki við HM?**

– Nei, vit vita at Holland er við í HM, og vit hava sjálvandi eisini fingið úrslitini við. Men, fyri at vera heilt erligur, so leggja vit onki í fótboltin. At ferðast á opnum havi gevur okkum nógv meir, enn at sita framman fyri skíggjanum og hyggja eftir fótbólti.

■ **Hvussu leingi steðga tit í Føroyum?**

– Vit verða her til og við hósdagin. Í morgin fara vit at leiga ein bil, og so fara vit at koyra runt her í landinum. Vit halda at her eru einir 50.000 ferðaleiðarar, tí at øll eru so hjálpsom og fryntlig, siga teir flennandi.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 8 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 6 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 10 |
| Lerwick | 10 |
| Aberdeen | 13 |
| London | 23 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 12 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 30 |
| Warzawa | 26 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 26 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 27 |
| Athen | 31 |
| Malta | 34 |
| Tunis | 39 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 34 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | 14 |
| New York | 23 |
| Miami | 26 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 21 |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 10 |

### LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1007 hPa. við Ísland fer spakuliga í landnyrðing og brúgvalagið haðani til Føroya fer eystureftir.Eitt hátrýst, 1022 hPa. við Írland fer móti Norðsjónum.




**Í dag:**
Lágtrýstið sunnan fyri Ísland stendur mestsum í stað og dýpist. Brúgvalagið haðani verður við Føroyar hósnáttina.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 25/6 kl. 06[00]– 26/6. 06[00]. Hitin í gjár: 9,6°
Minsti hiti máldur í juni: -0,3° - Mesti hiti máldur í mai: 20,0°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 0,1 mm – mált frá 25/6 kl. 06[00]– 26/6 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juni: 49,3 mm

GEVIÐ BLÓÐ

Sosialurin

## VESTFALLSKYRRINDI

16. juni – Mánin næstur jørðini
25. juni – Tendring
1. juli – Mánin longst frá jørðini
3. juli – Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2006

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 27. juni | 08.56 | 21.23 | 07.56 | 20.23 | 08.11 | 20.38 | 10.56 | 23.23 | 11.56 | - | 07.11 | 19.38 | 06.11 | 18.38 | 09.11 | 21.38 | 10.11 | 22.38 | 08.41 | 21.08 | 09.56 | 22.23 |
| 28. juni | 09.46 | 22.10 | 08.46 | 21.10 | 09.01 | 21.25 | 11.46 | - | 00.23 | 12.46 | 08.01 | 20.25 | 07.01 | 19.25 | 10.01 | 22.25 | 11.01 | 23.25 | 09.31 | 21.55 | 10.46 | 23.10 |
| 29. juni | 10.31 | 22.53 | 09.31 | 21.53 | 09.46 | 22.08 | 00.10 | 12.31 | 01.10 | 13.31 | 08.46 | 21.08 | 07.46 | 20.08 | 10.46 | 23.08 | 11.46 | - | 10.16 | 22.38 | 11.31 | - |
| 30. juni | 11.13 | 23.33 | 10.13 | 22.33 | 10.28 | 22.48 | 00.53 | 13.13 | 01.53 | 14.13 | 09.28 | 21.48 | 08.28 | 20.48 | 11.28 | 23.48 | 00.08 | 12.28 | 10.58 | 23.18 | 00.53 | 12.13 |

5 707265 100036 >